# Fay Weldon á Listastevnuni

**Stóra rithøvundanavnið á Listastevnuni í ár verður Fay Weldon. Hon er víðagitin kring allan heim fyri sín skaldskap, sum oftast vísir heimin frá einum øðrvísi kvinnuligum sjónarhorni**

LISTASTEVNA
*Heri á Rógvi*



*Rithøvundurin Fay Weldon kemur til landið á Listastevnuni í august. Trupult var at fáa eina góða mynd til vega, men øll fáa so møguleikan at síggja og hoyra hana á Listastevnuni.*

Við á Listastevnuni í ár, sum verður hildin í døgunum 7. til 17. august verður rithøvundurin Fay Weldon.

Nógvir føroyingar kennast óivað við skaldskapin hjá Fay Weldon. Hon hevur verið virkin í nógv ár sum rithøvundur. Hennara fyrsta skaldsøga kom út í 1967, men áðrenn hetta hevði hon longu skrivað hópin av leikritum til útvarpsleik, sjónleik og sjónvarpsleik.

Oddvá Nattestad, samskipari fyri Listastevnuna, sigur, at teir hava fingið ein teldupost frá Fay Weldon, har hon váttar, at hon er sinnað at koma til landið á Listastevnuna.

Hon og maður hennara koma til landið í august, og tey hava longu gjørt greitt, at tey eru sinnaði at steðga fleiri dagar fyri at kunna uppliva landið.

Oddvá Nattestad sigur, at tey eru ógvuliga fegin um at fáa eitt tilíkt navn á Listastevnuna. Tað hevur allatíðina verið ætlanin at fáa ein viðurkendan rithøvund hendavegin á Listastevnuna, og Fay Weldon livir fult og heilt upp til hetta heitið, meta fyrireikararnir av Listastevnuni.

Í hesum mánaðinum og í komandi mánað skulu fyrireikararnir av Listastevnuni og Fay Weldon og maður hennara gera av, hvat Fay Weldon skal gera, meðan hon er í Føroyum.

– Hon hevur sagt, at hon vil fegin siga eitt sindur frá um seg sjálva og skaldskap hennara, og so er hon eisini áhuga fyri at hava eitt panel, sigur Oddvá Nattestad.

Sum sagt skulu fyrireikararnir og Fay Weldon sjálv nú finna útav, hvat hon fer at siga við føroyingar og nær, men tað er so avgjørt, at hon kemur, soleiðis at áhugaðir føroyingar hava nakað at gleða seg til.

Tað var Kári Árting á bókasøluni í SMS, sum fekk samband í lag við Fay Weldon. Hann var á bókamessu í Forum í Keypmannahavn, og har hitti hann Fay Weldon og spurdi, um tað hevði havt áhuga hjá henni møguliga at lagt leiðina tilFøroya.

Hon vísti seg at vera áhuga, og Kári boðaði frá til Listastevnu fyrireikararnar.

– Vit sendu beinanvegin eina innbjóðing, og tað vísti seg skjótt, at áhugin var veruligur, og alt hevur gingið upp á stás við at fáa hana hendanvegin, sigur Oddvá Nattestad.

Tvær reisir eru verk eftir Fay Weldon umsett til føroyskt. Bergljót Joensen (seinni Bergljót av Skarði) hevur umsett leikin, ið á føroyskum eitur Feit og fregin. Hetta er ein sjónleikur, sum er skrivaður burturúr skaldsøguni »The Woman's Fat Joke«. Leikurin hevur verið spældur í Føroyum, men handritið er ikki útgivið.

Sambært upplýsingum hjá Landsbókasavninum er leikurin umsettur úr svenskum.

Dagny Joensen hevur umsett framtíðarsøgan »The Cloning of Joanna May«. Føroyski heitið er Joanna og klóningar hennara. Hendan bókin kom út í 1995.

Fay Weldon fyllir í 2003 sjeyti ár. Hon hevur verið gift fleiri ferðir, og hon eigur eisini fleiri børn.

Hon og maður hennara, Nick Fox, búgva í Newcastle í Onglandi.

### Nógvar bøkur

Síðani hennara fyrsta bók, »The Woman's Fat Joke«, kom út í 1967 hevur Fay Weldon givið eina longri røð av bókum út. Eisini hevur hon sum nevnt skrivað nógv leikrit.

Nógv kennast óivað eisini við filmin She-Devil, har Roseanna Barr og Meryl Streep høvdu høvuðsleiklutirnar.

Filmurin er gjørdur eftir skaldsøguni »The Life and Loves of a She Devil«, sum Fay Weldon skrivaði og gav út í 1983.

Søgan og filmurin snúgva seg um eina kvinnu, sum kanska ikki ger so nógv burturúr sær sjálvari, og maður hennara fer eisini frá henni og flytur saman við einari yngri, ríkari og vakrari kvinnu.

Hetta noyðist hann seinni at angra, tá Ruth, sum konan kallast, setir sær fyri stig fyri stig at oyðileggja lívið hjá fyrrverandi manni sínum. Í sama viðfangið fær hon eisini stimbra sítt egna sjálvsvirði og finna eydnuna í lívinum – og maðurin finnur alt annað.

Søgurnar og lagnurnar í bókunum eru oftast kvinnur, sum eisini bíta frá sær og bróta við ideali.

Nevnda dømi við vælumtókta filminum er bert eitt av nógvum dømum um kvinnusøgur, sum Fay Weldon.

Hon hevur eisini skrivað onkra framtíðarsøgu, m.a. »Joanna og klóningar hennara«.

Hon er framvegis virkin sum rithøvundi, hóast hon kanska ikki er líka væl umtókt longur. Seinasta bókin hjá henni kom út í 2002. Talan er um stuttsøgusavnið Nothing to Wear & Nowhere to Hide

### Ný Sæland

Annars er tað at siga um Fay Weldon, at hon varð borin í heim í Onglandi í 1933, men hon flutti sum fimm ára gomul til Ný Sæland, har hon er uppvaksin.

Hon búði saman mammuni, systrini og ommuni, og sagt verður av kennara, at hon tað sum um, at kvinnur fyltu heimin, og hetta hevur eisini sett síni spor í skaldskapi hennara.

Hon hevur lisið sálarfrøði og búskap í Onglandi, og áðrenn hon byrjaði at skriva fulla tíð arbeiddi hon millum annað á einari lýsingastovu.

## Reallønarhækking á 3,11%

**Arbeiðarar hava í 2002 havt ein reallønarvøkstur á 3,11%. Lønirnar hækkaðu 1. mai 2002 við 4,82%, meðan prístalið í 2002 er hækkað við 1,71%. Hetta er tí ein veruligur lønarvøkstur**

TÍÐINDASKRIV
*Vinnuhúsið*

1. mai 2002 hækkaðu minimumstímalønirnar hjá arbeiðarum úr kr. 87,96 til kr. 92,20 ella ein hækking við kr. 4,24. Í prosentum 4,82%. Við ársbyrjan í 2002 var prístalið 99,3 og við ársbyrjan 2003 – 101,0. Prístalið er soleiðis hækkað við 1,71% og gevur hetta ein reallønarvøkstur á 3,11%.

Fakfeløgini hava í sambandi við farnar sáttmálasamráðingar lagt stóran dent á at vísa prísvøksturin í samfelagnum, men hevur hetta verið heldur trupult orsakað av, at onki álítandi prístal hevur verið. Nú er eitt nýtt prístal fingið til vega, og tað gevur ábendingar um, at tað neyvan er grundarlag fyri høgum lønarkrøvum til várs.

## Prístalið er hækkað við 0,3% síðsta ársfjórðing

**1. oktober 2002 var prístalið 100,7 og 1. januar 2003 101,0. Hetta er ein hækking á 0,3%, sum er ein lágur prísvøkstur**

TÍÐINDASKRIV
*Vinnuhúsið*

Tað serliga við prístalinum 1. januar 2003 er, at matur og drekka, sum er vektað 21,3% í tí samlaða prístalinum, er lækkað við 1%. Tað er serliga fiskur og grønmeti, sum standa fyri lækkingini.

Hækkingarnar eru farnar fram innan klædnavørur, har prísirnir eru hækkaðir við 1,8% (saman við fótbúnaði 1,6%). Harnæst kemur flutningur við 1,5% og býli við 1,2%. Innan flutning eru akførini og rakstur av akførunum vorðið dýrari og innan býli eru sethús rentuútreiðslur lækkaðar, meðan ravmagn og hiti eru hækkað.



# Aftur til arbeiðis

**Eftir at verkfallið í fiskivinnuni er av, byrjar eitt nýtt ár hjá føroysku fiskivinnuni. Hóast vøksturin ikki er tann sami, royndist farna árið væl hjá flestu skipabólkum, tó undantikið rækjuflotan**

FISKIVINNA
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Aftur í fjør var mest at forvinna við nótaskipunum, har daglønin hjá einum dekkara lá omanfyri 3500 krónur*

Eftir eina heldur longri jólafrítíð, ið komst av sáttmálatrætuni millum Reiðarafelagið og Skipara- og Navigatørfelagið hevur fiskiskipaflotin loksins loyst aftur, og eitt nýtt ár er byrjað í høvuðsvinnuni.

Fiskivinnan hevur seinastu árini riðið á einum alduryggi, hvat úrtøku viðvíkur, og sum heild royndist árið í fjør eisini væl hjá fiskimanninum. Innan fleiri skipabólkar tykist tó stíður at vera komin í stóra inntøkuvøksturin seinnu árini. Tað vísir uppgerðin hjá Fiskimannafelagnum yvir, hvussu farna árið royndist hjá fiskimanninum.

Fiskimannafelagið ger á hvørjum ári upp, hvussu inntøkan hevur verið hjá fiskimonnum innan ymsu skipabólkarnar, roknað sum miðalinntøkuna fyri dagin, skipið er til fiskiskap. Á henda hátt ber til at samanbera inntøkuna hjá fiskimanninum, sammett við inntøkuna hjá einum arbeiðara á landi. Tølini, ið eru at finna í ársfrágreiðingini hjá Fiskimannafelagnum, byggja á avrokningar hjá limunum. Sostatt ber ikki til at gera árið endaliga upp, fyrr enn seinasta avrokningin fyri 2002 er komin frá reiðarínum, og tí eru tølini yvir samlaðu ársinntøkuna heldur ikki endalig.

### Nótaskipini aftur best

Eins og fleiri av undanfarnu árum var tað við nótaskipunum, at inntøkan var størst í fjør. Í meðal var ein dagløn umborð á einum nótaskipi 3553 krónur um dagin. Nótaskipini vóru í meðal úti í 210 dagar í fjør, og fyri ein dekkara gevur tað eina miðalinntøku uppá 746.000 krónur. Men hóast hetta var 2002 ikki eins gott fyri nótaflotan sum árið fyri, vísa tølini hjá Fiskimannafelagnum. Talan var nevniliga um eina minking í miðalinntøkuni pr. dag uppá átta prosent, sammett við 2001.

Men tað var ikki bara hjá nótaskipunum, at árið í fjør royndist væl. Fleiri aðrir skipabólkar høvdu eitt gott ár í fjør, og tað sæst aftur í manningapørtunum. Hjá fiskimonnum við stóru hekkutrolarunum á saltfiska- og flakaveiðu var talan um ein inntøkuvøkstur uppá 40 prosent, sammett við árið fyri, um roknað verður við lønini pr dag, menn vóru burtur. Í meðal var daglønin hjá einum dekkara við hesum skipum 2505 krónur. Teir fyrstu 209 dagarnar í fjør, sum skipini vóru til fiskiskap, var miðalhýran fyri ein dekkara við hesum skipum var í meðal 523.000 krónur, ið er tað sama, sum inntøkan var alt árið 2001.

Fyri stóru ísfiskatrolararnar var talan um ein inntøkuvøkstur uppá níggju prosent, roknað pr dag umborð. Daglønin við hesum skipum var í meðal 1733 krónur, og tá árið var farið at halla, og skipini í meðal høvdu verið til fiskiskap í 238 dagar, ið eru 10 dagar færri enn alt árið 2001, var samlaða hýran fyri ein dekkara var komin uppá 411.000 krónur.

Hjá smáu ísfiskatrolarunum var árið í fjør rættuliga meinlíkt árinum fyri, og inntøkan var at kalla tann sama. Í meðal var daglønin hjá einum dekkara 1854 krónur, og samlaða hýran var 458.000 krónur, eftir at skipini høvdu verið til fiskiskap í 247 dagar.

Fiskimenn við ísfiskalínuskipunum høvdu ein inntøkuvøkstur uppá 15 prosent í fjør, um hugt verður at lønini pr fiskidag. Daglønin við einum ísfiskalínuskipi var 1706 krónur. Í 2001 vóru hesi skip til fiskiskap í 219 dagar, og tá skipini høvdu verið til fiskiskap í 197 i fjør, var samlaða inntøkan komin uppá tað sama sum alt árið fyri, ella 336.000 krónur.

Skipini, ið fiska eftir ídnaðarfiski, vóru í meðal til fiskiskap í 140 dagar í fjør, og har var daglønin 1175 krónur.

### Aftur ringt ár hjá rækjuskipunum

Eisini 2002 gjørdist eitt soltið ár hjá fiskimonnum við føroysku rækjuskipunum. Í meðal var daglønin hjá einum dekkara við hesum skipum 1206 krónur. Hesi skip gera vanliga langar túrar, og tí fevnir ein avrokning um nógvar dagar burtur. Men tá skipini høvdu verið til fiskiskap í 189 dagar, var meðal hýran hjá einum dekkara við hesum skipum komin uppá 228.000 krónur. Her kann nevnast, at árið fyri vóru rækjuskipini í meðal 302 dagar burtur.

Eisini hjá garnaskipunum, ið royna eftir svartkalva- og havtasku, var 2002 verri enn árið fyri. Í meðal var daglønin við hesum skipum 1391 krónur í fjør, ella 17 prosent minni enn í árið fyri. Í 2001 vóru skipini í meðal úti í 267 dagar, og tá var manningaparturin 450.000 krónur. Eftir at skipini høvdu verið úti í 225 dagar í fjør, var manningaparturin komin uppá 314.000 krónur.

# 10.000 fløskur

**Seinnapartin leygardagin gingu limir í kórinum Sound of Glory hús úr húsi í høvuðsstaðnum at savna inn fløskur til eina ferð til Prag í summar. Úrtøkan var góð, men av tí at stundir ikki vóru at fara í øll hús, fara tey aftur til verka leygardagin**

INNSAVNAN
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*– Enn hava vit ikki talt, men eg haldi at har munnu vera umleið 10.000 fløksur, sigur Meinhard Arge Jensen, formaður í kórinum Sound of Glory. Seinasta leygardag gingu tey hús úr húsi í Havn fyri at biðja um fløskur, og næsta leygardag verður farið í tey hús, har tey ikki náddu á gátt.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

- Enn hava vit ikki talt fløskurnar, men eg meti at fløskurnar munnu vera umleið 10.000 í tali.

Meinhard Arge Jensen, formaður í kórinum Sound of Glory, er væl nøgdur. Seinasta leygardag gingu limirnir í kórinum hús úr húsi í høvuðsstaðnum og bankaðu á dyrnar hjá fólki fyri at spyrja eftir tómum fløskum. Ein leyslig meting hjá formanninum sigur so, at úrslitið var umleið 10.000 tómar fløskur frá havnafólki.

So nógv høvdu fólk at lata, at kórlimirnir langt frá komu í øll hús, og tí ætla tey sær avstað aftur at banka á dyrnar hjá fólki næsta leygardag.

Útvið 70 fólk eru í kórinum, og flestu teirra vóru við seinasta leygardag. Tey høvdu sett nakrar tímar av til endamálið seinasta leygardag, men hetta skuldi so vísa seg at vera alt ov stutt tíð at koma í øll hús, hóast tey vóru væl mannaði.

- Síðan leygardagin hava fleiri fólk vent sær til okkara og sagt, at tey høvdu savnað fløskur saman til okkara, men at vit síðan ikki komu eftir teimum. Men vit hava so gjørt av, at vit fara avstað aftur seinnapartin næsta leygardag, og tá ætla vit so at fara á gátt í øllum húsum í Havn, har vit ikki komu seinasta leygardag, sigur Meinhard Arge Jensen.

### Ferð til Prag

Sound og Glory er eitt sonevnt Ten Sing kór, har luttakarar hittast fyri at syngja, men har dentur harumframt verður lagdur á at hava tað stuttligt og hugnaligt saman á kristnum grundarlag. Tey halda til í KFUM í Havn, har venjingarnar eisini fara fram.

Í summar ætla tey sær út um landoddarnar at ferðast, fyrst til Norra, og síðan til Prag, har tey skulu taka lut í stóra tiltakinum »YMCA Europe 2003« ið verður hildin dagarnar 3.-9.august. Á stevnuni hittast umleið 8000 ungdómar, ið hava sína gongd í KFUM-felagsskapum kring alt Evropa. Tiltakið fevnir um konsertir, drama, kjakløtur, bíbliutímar o.a.

Í samband við túrin til Prag ætla tey sær at hava fleiri tiltøk fyri at savna inn pengar. Fløskuinnsavnanin er fyrsta tiltakið, og sigast má, at tey hava fingið eina góða byrjan.